

»NALVIN«

**Nýggja kioskin**
**í Hósvík**

hevur opið:
mánadag til fríggjadag
frá kl. 18–23.00

Leygardag & sunnudag
frá kl. 14–23.00

**Allar kioskvørur**
**Donsku vikubløðini**
**Føroysku bløðini**
kvøldið fyri útgávudagin

*Vælkomin inn á gólvið*

*Terje Hagevang, leitingarstjóri hjá SAGA:*

# Eru komnir gjøgnum basalt - síggja nýggja broyting longur niðri

*Millum 100 og 150 metrar longur niðri í føroysku undirgrundini tvs. á umleið 3650 metra dýpi sæst broyting í seismikkinum. Her kann antin vera talan um eina nýggja basaltflá, sedimentløg, sum ikki eru av vulkanskum uppruna ella okkurt heilt annað. Oljufeløgini hava gjørt av at bora longur enn ætlað fyri at vita, hvat henda broytingin merkir.*

JAN MULLER

Hóast komið var á mál í Lopra, tá teir nú um dagarnar komu niður á 3500 metrar, so verður kortini hildið fram at bora nakað aftrat.

Terje Hagevang, sum er kanningarstjóri hjá norska oljufelagnum SAGA, er væl nøgdur við boringina í Lopra. Saga er millum tey 19 oljufeløgini, sum fíggja hesa verktætlanina og hann er fegin um at vera við. Teir hava nevniliga fingið nógvar áhugaverdar upplýsingar um føroysku undirgrundina, sum teir ikki høvdu framman undan.

Hann váttar, at tað hevur verið fundur í samstarvsbólkinum hjá oljufeløgunum, har tosað hevur verið um teir skuldu bora longur niður, nú játtanin er um at vera uppi.

Úrslitið av tí er so, at tað verður borað nakað meira. Eingin ávís upphædd verður sett av, men arbeitt verður út frá ávísum kriterium. Helst verður talan um at bora einar 100 til 150 metrar aftrat skilst.



*Terje Hagevang, leitingarstjóri hjá Saga er spentur um, hvat boringin næstu dagarnar fer at vísa*

**Broyting longur niðri**

Terje Hagevang sigur, at orsøkin til at teir vilja bora longur niður er tann, at VSP-kanningarnar, sum longu eru gjørdar í holinum, hava víst ein seismiskan reflektor longur niðri. Ein seismiskur reflektorur merkir, at har er ein ella onnur broyting í løgunum.

Sum Sosialurin skilur tað, so eru menn spentir at vita, um henda broytingin er ein nýggj basaltflá, sedimentløg ella uppaftur annað.

Terje Hagevang, sum ikki vil upplýsa stórvegis um úrslitið av boringini váttar tó, at teir eru komnir gjøgnum basalt og í onnur løg. Teir hava borað fleiri hundrað metrar gjøgnum onnur løg enn basalt. Hesi løgini eru sedimentløg av vulkanskum uppruna. Tvs. tað er fyri tað mesta vulkansk øska. Sum blaðið skilir eru hetta ikki júst løg, har ein roknar við at finna olju ella gass.

Nú teir bora víðari góðar 100 metrar ella meira er spenningurin stórur um, hvat seismiski reflektorurin vísir, tvs. um hann er ein nýggj basaltflá ella t.d. sedimentlag, sum ikki er av vulkanskum uppruna. Meiningin í løtuni er í hvussu so er tann, at møguleiki er fyri, at her er talan um eitt annað grótslag.

Terje Hagevang frá Saga váttar fyri Sosialinum, at teir hava enn einki sæð til grundfjall.

Hann leggur annars dent á, at teir longu nú hava fingið nógv burtur úr boringini. Sjálvur leggur hann áherðslu á, at detailupplýsingar frá boringini ikki koma út til oljufeløg, sum ikki eru við at gjalda. Tí kemur heldur ikki stórvegis út.

Hann heldur annars, at høvdu fleiri oljufeløg, sum vissuliga hava áhuga fyri føroyska økinum, verið við í boringini, so hevði størri møguleiki verið fyri, at boringin kanska hevði kunnað hildið fram longur niður.

Men hóast hetta so er hann væl nøgdur við úrslitið og bíðar nú spentur eftir at vita, hvat tann umrødda broytingin nakað longur niðri vísir.

Terje Hagavang leggur dent á, at føroyska økið er ikki minni áhugavert eftir hesa boringina. Kanska heldur tvørturimóti. Saga heldur í hvussu er fram við arbeiði sínum á føroyskum øki og longu miðjan november kemur stór delegatión frá felagnum til Føroya fyri eitt nú at hava kunnandi fund við fjølmiðlarnar.

**Móttøka**

Mánadagin letur Dr. Margrethu Barnagarður v/ K.F.U.M. og K. upp nýggja stovu, í bygninginum hjá Tummas Thomsen. Í hesum sambandi verður skipað fyri

**MÓTTØKU**
**leygardagin 2. november**
**frá kl. 15.00 til 17.00.**

Nevndin

**Minningarhald teirra sjólátnu**

*verður í Klaksvík við minnisvarðan*
*í Vágstúni í dag kl. 15.00*

**Skráin:**
Jógvan við Keldu bjóðar vælkomin
KFUM-kórið syngur
Felagssangur, »Guð signi várt fólk«
Eyðun Elttør heldur røðu
Kransar verða lagdir. Jógvan við Keldu vegna Klaksvíkar býráð, Sámal Petur í Grund vegna Føroya Landsstýri, Frits Olsen vegna Klaksvíkar Útróðrarfelag, Andreas Reyðberg vegna Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, og Hanna Ísaksen vegna Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Felagssangur, »Stýr míni skútu«
KFUM-kórið syngur
Jógvan við Keldu takkar

**Frá Hollywood**

Fríggjakvøldið spæla
**Bergmenn**

Leygarkvøldið spæla
**Ronnie, Arnbjørn og Kolbein**
gamlan, góðan dansitónleik

**HOLLYWOOD**